
Torbjørn Kjus, oljugreinari hjá DNB Markets. Mynd: Stig B. Fiksdal/DNB

# Oljuprísurin heldur sær undir 50 dollarum

**Jógvan Hugo Gardar**

07.08.2015 - 09:50

Oljan.fo

Oljuprísurin er hesa vikuna lækkaður munandi. Í summar er prísurin á Norðsjóvaroljuni Brent lækkaður frá umleið 65 dollarum fyri fatið niður móti 50 dollarum. Mánadagin fór prísurin fyrstu ferð farna hálva árið niðurum 50 dollarar fyri fatið. Í gjár var prísurin um 49,50 dollarar, og í morgun er prísurin fyri Brent-oljuna 49,70 dollarar. Amerikanska lættoljan WTI kostar í morgun 44,8 dollarar fyri fatið. Tað er á leið sami prísur sum í gjár.

Oljugreinarin Torbjørn Kjus hjá DNB Markets sigur í samrøðu við E24 at tað ikki er óhugsandi at oljuprísurin kemur at liggja um 50 dollarar fyri fatið í heyst.

Sambært Kjus eru tað fleiri tekin sum benda á at oljuprísurin kann koma vera verandi um teir 50 dollararnar.

· Hann nevnir ófriðin á keypsskálunum í Kina, ið ávirka rávørumarknaðin.

· Meksiko plagar at tryggja sær olju tá vit nærkast nýggjárinum, men í ár hevur Meksiko longu gjørt tað. Hetta kann ávirka hvussu prísurin fyri 2016 kemur at vera í marknaðinum.

· Oljuframleiðslan setir nýggj met, samstundis sum marknaðurin flýtur í olju. Serliga eru tað Saudi-Arabia og Irak sum hava økt um framleiðsluna.

· Kjarnorkuavtalan við Iran ger at roknast kann við enn meir olju á heimsmarknaðinum.